

ÚTOYGGJAFELAGIÐ

Geilargøta 6
FO-513 Syðrugøta
Tlf. +298 757969
utoyggj@utoyggj.fo
www.utoyggj.fo

# Góðu limir og stuðlar í útoyggjafelagnum

Hetta er eitt tíðindabræv, ið vit vóna kann geva tykkum eitt sindur av innlitið, í hvat útoyggjafelagið arbeiðir við í løtuni. Av tí at Glóðin ikki kemur út longur, vilja vit royna henda kunningarháttin í staðin.

## Nevnd og umboðsráð

***Starvsnevndin***

Óla Jákup úr Dímun, Stóru Dímun, formaður: Tlf. 371260.
Esbern í Eyðansstovu, starvsnevndarlimur Mykines: Tlf. 228185
Olga Biskopstø, starvsnevndarlimur og samskipari: Tlf. 441314/217969

| ***Umboðsráðið*** | Fríða Isaksen, Húsar, formaður í umboðsráðnum: tlf. 457900 |
|---|---|
| Johanna Hansen, Hattarvík | Katrina Johannesen, Mykines |
| Andras í Frammistovu, Kirkja | Sanna Silvurstein, Hestur |
| Óli á Geilini, Tórshavn/Svínoy | Bjørn Patursson, Koltur |
| Eyðun Jacobsen, Svínoy, tiltakslimur | Sóley Thomsen, Skúvoy |
| Jona í Lon, Húsar, tiltakslimur | Jógvan Jón Petersen, Stóra Dímun |
| Eyðun Eliasen, Trøllanes | Magnus Eliasen, Æðuvík/Mikladalur: |

Virksemi hjá felagnum er skipað soleiðis, at Olga Biskopstø hevur dagliga virksemi á skrivstovuni um hendi, og samskipar verkætlanir og tiltøk. Starvsnevndin hevur regluligt samskifti, har tiltøk og mál, ið viðkoma felagnum eru til kjak. Miða verður ímóti, at umboðsráðið møtist minst tvær ferðir um árið, at ráðleggja um virksemi felagsins.

## Yvirlit yvir virksemi í felagnum júst nú

1. Skrivstovan og dagliga samskifti við limir og myndugleikar
2. Fyriskipan av skeið m.a. um íverksetan og ferðavinnu (nýtt skeið komandi vár)
3. Ráðstevna 19. november kl.13.00 á Hotell Hafnia. Øll eru væl komin.
4. Útoyggjastevnan (Vantandi verður hon í Hesti næsta ár)
5. Tiltak fyri ung á útoyggj – vári 2010
6. Verkætlanir: *Vinnuligar*
   a. Nordic Delight *(kunnandi fundir um hetta vera í jan./febr. 2010)*
   *b.* Economusée *(Smiðjan á Trøllanesi er fyrsta tiltakið)*
   *c.* Mentanarsøgulig landsløg Fugloy *(Verkætlanin er komin í gongd)*
   d. Framleiðsluhús á útoyggj *(Bíðar eftir næstu oyggj, ið bjóðar seg fram)*

7. Privatar og almennar verkætlanir, ið Útoyggjafelagið stuðlar undir:
    a. Gistingarhús í Mykinesi
    b. Ferðavinnutiltøk í Svínoy
    c. Fjølbýlið í Fugloy – felagshús og ferðavinna
    d. Ferðavinna í Skúvoy
    e. Ferðavinna á Húsum
    f. Ferðavinna í Hesti
    g. Ferðavinna í Mikladali
    h. Grønar útoyggjar (Alternativ orka skal avloysa oljutunnurnar)

Øll tiltøkini, ið eru nevnd omanfyri, eru klár at fremja, men mangla fígging og í onkrum førum fakliga hjálp. Vit meta, at tað ikki er gjørligt at fáa hesi tiltøk í gongd uttan so, at ein av verandi grunnum/peningastovnum ella ein nýggjur grunnur verður skipaður, ið er meira váðafúsur enn verandi fíggjarstovnar, umframt at onnur hjálp verður veitt til íverksetan.

## Niðanfyri er ein stutt lýsing av nøkrum at tiltøkum, ið eru nevnd

### *Skrivstovan*

Skrivstovan er ein týðandi partur av virksemi felagsins. Árliga fær felagið nógvar áheitanir frá fólki á útoyggj og øðrum, um at vegleiða at hjálpa við ymiskum. Tað kann vera líka frá at loysa praktiskar trupulleikar, sum stinga seg upp, til áheitan um ráðgeving í sosialum og vinnuligum spurningum.
Umframt ráðgevandi partin, stendur skrivstovan fyri øllum samskifti við stovnar og fyritøkur. Eitt nú er samskiftið um samferðsluna eitt av teimum málum, ið fyllur nógv, hóast tað tykist vera sera trupult at síggja nøkur positiv úrslit. Øll er væl komin at venda sær til skrivstovuna við fyrispurningum og áheitan um hjálp til eitt hvørt.

## Skeiðvirksemi í 2009

### *Skeið um íverksetan og ferðavinnu*

21 september, var hildið skeið um íverksetan og ferðavinnu. Skeiðið var boðið út á útoyggj. 14 luttóku á skeiðinum. Ætlanin er, at hava eitt skeið afturat í vár, við sama heiti. Tá er ætlanin at arbeiða ítøkiliga við íverksetan av matstovuvirksemi/cafée o.ø. tiltøkum fyri ferðafólki komandi summar.
Málið er at skipa onnur skeið, sum kunnu hava áhuga á útoyggj, serliga skeið, ið kunnu gagna vinnu og inntøkugevandi virksemi.

### *Skeið fyri ung á útoyggj*

Í 2007 og 2008 var skipa fyri skeið fyri ung. Málið var at skapa sosialt samband millum tey ungu á útoyggj, men eisini at hava frálæru og kjak um møguleikar fyri vinnu og virksemi á útoyggj í framtíðini. Ætlanin er at halda eitt slíkt skeið komandi vár. Felagið metir, at hugskot og íblástur frá ungdóminum eru sera týðandi fyri arbeiðið hjá felagnum.

Virksemi hjá Útoyggjafelagnum verður fíggjað við limagjaldið og við peningi, sum vit søkja um frá ymiskum grunnum og fyritøkum. Innlendismálaráðið hevur seinnu árini eftir umsókn frá felagnum, stuðla við millum 90.000 og 140.000 av árligu játtanini til menning av útoyggjunum. Størri fíggjarlig veiting, hevði gjørt tað léttari at framt tær verkætlanir, ið felagið hevur á borðinum.

| | |
|---|---|
| **Nordic Delight**<br> | Hetta er ein sera umráðandi og góð verkætlan fyri útoyggjarnar. Vit settu hol á hetta tiltak í fjør, tá vit fingu tvey fólk at koma úr Noregi, at halda skeið um framleiðslu av vørum til ferðavinnu.<br>Skeiðið vardi í tveir dagar, og var hildið á Kokkaskúlanum í Klaksvík. Luttøkan var góð, og semja var um, at eitt slíkt tiltak, veruliga kann seta gongd á framleiðslu av serligum vørum, til ferðavinnuna.<br>Tær sum hildu skeiðið, komu frá verkætlanini Nordic Delight. Tær heittu á okkum, um at gerast partur av hesum átakið, saman við Norra, Íslandi og Grønlandi. Nú hava vit fingið játta pening frá NORA til at byrja arbeiðið. Vit í Føroyum skulu menna 2 til 5 vørur, sum vit skulu hava í framleiðslu komandi ár. Øll sum eru áhuga kunnu gerast partur av hesum tiltakið. |
| **Economusée**<br> | Arbeiðið við verkætlanini Economusée byrjaði í 2007. Í dag eru tað Útoyggjafelagið og Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning, ið hava ábyrgdina av tiltakinum. Onnur lond, ið vit samstarva við eru Norra, Ísland, Írland, Grønland og Kanada. Á vetri 2010 kunnu vit vantandi lata tað fyrsta Economusée upp í Føroyum og tað er Smiðjan á Trøllanesi.<br>Hetta tiltak er rættiliga spennandi fyri útoyggjarnar. Tí vónandi kunnu vit um nøkur ár, hava fleiri av hesum slag kring oyggjarnar. Talan er um eitt sera professionelt tiltak, har kundin/ferðamaðurin far eina veruliga uppliving av traditionellum handverki, í samvinnu við søgu og mentan. Tað er ein treyt, at Economusée-virkini eru burðardygg og geva gott fíggjarligt avkast.<br>Verkætlanin er fíggja av ES, Nora, MMR, Vinnuframagrunninum o.ø. |
| **Mentanarsøgulig Landsløg- Fugloy**<br> | Talan er her um stóra og umfatandi verkætlan úti í Fugloy. Henda verkætlan hevur ligið og bíða síðani 2002. Nú hevur felagið avgjørt, at verkætlanin skal gerast til veruleika. Vit eru byrja við, at gera eina bók, ið lýsir søgulig støð og hendingar í Fugloy. Hon verður liðug komandi vár, tá sjálv verkætlanin fer av bakkastokki. Størsta styrkin við hesi verkætlan er, at hon dregur bæði búsitandi og onnur inn í eitt felags tiltak fyri oynna.<br>Málið við verkætlanini er, at skipa eitt gott og væl gjøgnumarbeitt ferðavinnu økið í Fugloy. Men málið er eisini, at annað virksemi kemur í kjalarvørrinum á hesum. Tiltakið skal skapa arbeiðspláss og menna báðar bygdirnar og vónandi kann tiltakið fáa fólkatalið at vaksa aftur. Tiltakið skal fíggjast av kommununi, grunnum, virkjum og privatum íleggjarum. |
| **Framleiðsluhús**<br> | Fyrsta framleiðsluhúsið í Føroyum kann takast í brúk komandi vár. Hetta fyrista tiltakið er í Stóru Dímun. Útoyggjafelagið hevur arbeitt við hesi ætlan í fleiri ár, og tá tey sum búgva í Stóru Dímun vildu taka á seg at byrja har, vóru vit fús at bakka hesum upp.<br>Nú er tað okkara avbjóðing, at fara víðari við hesi verkætlan. Leisturin er gjørdur, tekningar eru tøkar og arbeitt verður við at skipa eina nýtslu og rakstrarskipan. Húsið verður ogn hjá kommununi, men skal latast til øll í bygdini at brúka, tí er tað týdningarmikið, at tiltakið er væl skipað og leikluturin hjá kommununi og brúkaranum greitt orðaður. Tað eru nógvir partar uppi í tiltakinum, bæði kommuna, Landsverk, IMR og bygdafólki, tí er tað ein krevjandi uppgáva hjá felagnum. Men tað er okkara vón, at gongd kemur á næsta framleiðsluhúsið komandi ár, og at peningur kann søkjast áðrenn november 2010. Hetta krevur tó, at kommunurnar bjóða seg fram og at bygdafólki er sinnað at samstarva. Eitt slíkt framleiðsluhús, kann økja um inntøkugrundarlagið hjá øllum teimum, ið hava góð hugskot og vilja hava meira burtur úr rávøruni. |